

*Heystframsýningin í høllini á Tórshavnar Skipasmiðju var heilt stóra myndlistatreffið í 05*
*Mynd: Jan Müller*



*Torbjørn Olsen umtulkaði sínar altartalvur í steinprentum*
*Mynd: Jens K. Vang*

*Tóroddur Poulsen er upplagt evni til Heystframsýningina*
*Mynd: Jens K. Vang*



lukkes man ind i samarbejdets fintmaskede net af muligheder, ideer, tanker, samtaler og dette og hint. Der kommer besøgende, få kender man, andre møder man første gang, så næste gang og næste gang. Værkstedet bliver et samlingspunkt, hvor mennesker mødes...". Mong av hesum vitjandi eru føroysk listarfólk, og tað er allarhelst óneyðugt at staðfesta, hvussu týdningarmikið tað er fyri yrkislistaumhvørvið at kunna møta hesum dugnaligu og vitandi listafólkunum uttanífrá og skifta orð um myndlistina. Av øðrum áhugaverdum útlendskum listafólkum, ið hava arbeitt í Grafiska Verkstaðnum hetta árið kunnu nevnast: Kathrine Ærtebjerg, Kjell Nupen og Peter Carlsen. Tað er annars ein føroyskur listamaður, ið hevur gjørt nakað av tí mesta spennandi, eg havi upplivað í verkstaðnum í ár. Tóroddur Poulsen, ið vit annars kenna sum yrkjara, er veruliga farin at gera um seg innan myndlistina. Hann hevur arbeitt í Grafiska Verkstaðnum tvær ferðir í 2005. Kanska hevur onkur lagt merki til, at yrkjarin í størri mun er farin at myndprýða síni yrkingarsøvn sjálvur, t.d. "Svøvnlendingur rættar kumpass" (2003): "Eygnamørk" (2004) og tað nýggja "Morgunbókin". Hóast tað ikki var fyrr enn einaferð miðskeiðis í hálvfemsunum, at gongd kom á tað myndlistarliga arbeiðið, so hevur myndlistin altíð ligið frammarlaga millum áhugamálini hjá Tóroddi. Meðan hann t.d. hevur skrivað yrkingar, eru smáar tekningar óavvitandi vaksnar fram millum orðini. Summi verða provokerað av tekningum Tórodds, sum á sama hátt sum yrkingarnar hava okkurt lætt og ómakaleyst yvir sær. Teirra útsøgn liggur ofta í millum skemt og álvara, millum tað ítøkiliga og óítøkiliga, og royndin at lýsa, hvat býr undir sorgblíða ella speiska pokersmílinum, kennist oyðileggjandi bókstavilig. Tóroddur Poulsen er annars eitt upplagt evni til Heystframsýningina, um hesin listabólkur ætlar at hýsa fleiri limum.

Føroysk myndlist hevur eisini á ymsan hátt gjørt um seg uttanlanda í árinum, ið fór. Eitt nú hevur Tróndur Patursson latið úr hondum heimsins størsta listaverk úr glasi; ein lyft til eitt parkeringshús í Vejle í 6 hæddum. 2005 var eisini eitt gott ár hjá Bárði Oskarsson, sum fyrst fekk 60.000 krónur úr Grunni Thorvald Poulsens av Steinum og sum síðan fekk bók sína "Ein hundur, en ketta og ein mús" selda til Fraklands. Søgan er eisini virkuliga góð og stuttlig, myndirnar ei um at tala. Tað kundi verið áhugavert um Bárður kundi flutt eitt sindur av skemtinum, yvirskotinum og speiseminum og ta fríu strikuna yvir í sínar stóru myndir. Áðurnevnda Sønderjyllands Kunstmuseum hevði stóra framsýning við og um Føroyar við heitinum: "Atlantisk Rapsodi. Billeder af Færøerne". Bók var útgivin í sambandi við framsýningina við nógvum og áhugaverdum greinum hjá Bárði Jákupsson, Inger Smærup Sørensen, Jan Andersson, Kristian Blak o.ø., sum tilsamans fyllir 122 síður á donskum og týskum.

## Tey eldru og tey ungu

Hetta árið gjørdist Lützenstrøð í Havn eitt keðiligari stað. Listamenninir og grannarnir báðir Eyvindur Mohr og Ingálvur av Reyni fóru báðir í Harrans hendur. Meðan Eyvindur hevði stóra ávirkan á mín byrjandi listaáhuga, var tað abstrakta listin hjá Ingálvi, ið hevði størsta áhugan sum vaksin. Báðir verða teir stórliga saknaðir.

Føroyskir tónleikarar eru forkelaðir, heldur Herdis Jakobsen, sum gongur í 1.flokki í Hoydølum. Hon ætlar sær at vera listakvinna og heldur, at korini fyri myndlistarliga áhugaðan ungdóm eru vánalig. T.d. er eitt nú eingin listaskúli í Føroyum, tú kanst ikki eingang velja fakið á hástig í Hoydølum og tað sær ikki út til, at nakað tiltak er á veg til tess at betra um støðuna. Hóast tekningarnar hjá Herdis kunnu tykjast barnsligar við staðiliga myndevninum av einari stóroygdari, lekrari babe, so er einki at ivast hvørki í hennara talenti ella viljastyrki. Í mun til føroyska list tykist hon sjálvstøðug hvat stíli viðvíkur og tykist meira ávirkað av útlendskum teknirøðum enn av heimligu listini. Myndirnar hjá henni eru møguliga japanskt ávirkaðar, stílurin liggur onkrastaðni millum Hokusai, Pokémon og amerikanska popplist. Tað verður áhugavert at fylgja við í hennara menning, sum m.a. er treytað av at okkurt verður gjørt frá almennari síðu fyri at betra um umstøðurnar hjá ungum listafólki í Føroyum.